LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Almanna- og mentamálaráðið
og
Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Tórshavn, tann 24. apríl 2025
J.Nr.: LUM-16- 25/05920-18
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit
um noktandi loyvi at ræna lomvigaregg

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um noktandi loyvi til eitt áhugafelag at ræna lomvigaregg eina viku í mai 2025. Noktandi avgerðin var grundað á, at tað ikki varð mett ráðiligt at gera inntriv í reiðringina hjá lomviga nakrastaðni í Føroyum, tá samlaði stovnurin enn kann metast at vera í niðurgongd. Tjóðsavnið hevur síðani 2010 einans givið eitt avmarkað loyvi til ræning av lomvigareggum í 2014. Sambært Fuglaveiðulógini er loyvt at taka lomvigaregg á hvørjum ári til og við 8. juni á ávísum støðum í ávísum fuglabjørgum eftir nærri kunngerð frá landsstýrismanninum. Treytin fyri at fáa loyvi, sambært kunngerðini, er millum annað, at Tjóðsavnið metir, at ræningin ikki skaðar stovnin munandi. Grundgevingin fyri at seta ræning av lomvigareggum inn í Fuglaveiðulógina í 1986 var, at vandi var fyri, at siðurin at ræna egg fall burtur. Umboðsmaðurin helt tí ikki, at Fuglaveiðulógin heimilar landsstýrismanninum heilt at forbjóða ræning í longri áramál uttan at taka atlit at siðinum at ræna egg. Umboðsmaðurin mælti til, at Almanna- og mentamálaráðið endurskoðaði kæruavgerðina og avmarkandi umsitingina av kunngerðini ella heitti á Uttanríkis- og vinnumálaráðið um at endurskoða heimildina fyri ræning av lomvigareggum í Fuglaveiðulógini, so samsvar er millum Fuglaveiðulógina, kunngerðina og umsitingina av henni.*

## 2. Klagan

Við telduposti, tann 26. februar 2025, sendi A vegna Áhugafelagið Lonin eina klagu um noktandi loyvi til at ræna lomvigaregg vestanfyri á Sandoynni í 2025. Í klaguni varð millum annað ført fram:

> " ...
> Áhugafelagið Lonin hevur søkt um loyvi at ræna lomvigaregg sambært § 1 í kunngerð 60 frá 1986 um ræning av lomvigaeggum. Sum vit lesa kunngerðina, so skal Tjóðsavnið, bara taka støðu til um 0,1% - 0,6% (0,1% er helst tað rætta talið) ávirkar stovnin munandi. Vit meina ikki at 0,1% -06% ávirkar stovnin munandi og sum Tjóðsavnið eisini meinti til 2011.

Vit klaga við hesum yvir, at Tjóðsavnið ikki fylgir kunngerðini.
...
Almanna- og mentamálaráðið staðfestir avgerðina hjá Tjóðsavninum um ikki at ganga umsóknini á møti frá Áhugafelagnum Lonin fyri 2025...
Almanna- og mentamálaráðið metir ikki, at grundalagið er fyri at seta metingina hjá Tjóðsavninum og viðmerkingar og tøl frá Fuglakanningarstøðini á Havstovuni til viks, sambært § 2, nr. 3 í kunngerð um ræning av lomvigaeggum.
Tjóðsavnið hevur svarað noktandi uppá umsóknina frá Áhugafelagnum Lonin, sent 3. november 2024, har Føroya Náttúrugripasavn (Tjóðsavnið) sambært § 1, í kunngerð 60 frá 1986 kann geva loyvi til ræning til og við 8. juni á hvørjum ári, um treytirnar í § 2 eru loknar.

Noktandi svar kann einans vera givið út frá § 2, stk. 3, um Tjóðsavnið metir, at ætlaða ræningin skaðar stovnin munandi; hettar stendur ikki í svari frá Tjóðsavninum 29. november 2024, til Áhugafelagið Lonin.
...
Áhugafelagið Lonin, søkti um loyvið at ræna í mesta lagi 500 egg. Sambært Havstovuni er landsins lomvigastovnur um 90.000 pør og av royndum, so vita bakka- og bjargafólk, at lomvigin verpur uppaftur. Serliga tá vit fara at ræna í tíðarskeiðinum 23. mai 2025 til 1. juni 2025, ið er tíðliga, og tísskil meira burðardygt, tí lomvigin tá oftari verpur uppaftur.

500 egg er 0,6% av tí samlaða lomvigastovninum, um helvtin verpur uppaftur er hetta 0,3% og um umleið 400 lomvigapør verpa uppaftur, so ávirkar ræningin í Lonini 0,1% av øllum tí føroyska lomvigastovninum.

Og tað er tað, sum Tjóðsavnið skal taka støðu til, samb. § 2, stk. 3, í kunngerð 60 frá 1986, um 0,1% ella í ringasta føri 0,6%, fer at skaða føroyska lomvigastovnin munandi.

Hetta er í stórari andsøgn til, at tað 4 mánaðir seinni frá 1. oktober til 20. januar er loyvi at skjóta fleiri 1000 lomvigar - hetta má heldur metast at kunna skaða føroyska lomviga stovnin munandi. Skotnir lomvigar verpa ikki uppaftur, hvørki sama ár ella komandi ár.

Áhugafelagið Lonin, hevur ikki ført fram, at lomvigastovnurin í Føroyum ikki er minkaður síðani 1970'ini. Men felagið metir ikki, at Tjóðsavnið kann avgera, at okkara ætlaða ræning fer at skaða stovnin munandi, við tí grundgeving at stovnurin er í minking.

Sandingar hava fingið loyvi frá ... PhD og professara í Zoology á Føroya Nátturugripasavnið (Tjóðsavninum) at ræna lomvigaegg til og við 2010..."

Tann 28. februar 2025 var umboð fyri Áhugafelagið Lonin á gátt hjá umboðsmanninum við prentaðum avriti av klaguni. Í hesum sambandi varð nevnt, at eitt av endamálunum við umsóknini var, at næsta áhugaða ættarlið fær møguleikan at fáa kennskap til bakkan.

Saman við klaguni lá millum annað ein avgerð frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, dagfest 19. juli 2021, viðvíkjandi aðrari klagu frá Áhugafelagnum Lonin um loyvi at ræna lomvigaregg í

Sandsbjørgum. Í avgerðini frá 2021, sum eisini var noktandi, síggjast áhugamál felagsins endurgivin á henda hátt:

> "…Felagið sigur seg vilja varðveita rættindi og bjargasiðir í fuglabjørgunum.
> Áhugi felagsins er at ræna og fleyga fugl, sum er ein partur av at røkja fuglabjørgini, sum føroyingar hava gjørt alla tíð, har næsta áhugaða ættarliðið fær møguleikan at søkja um at fáa eitt trygt og náttúrligt samband við bakkan og ikki minst kennskapin til teir vandar, sum kunnu koma í…"

## 3. Málslýsing

Noktandi avgerðin frá Tjóðsavninum var dagfest 29. november 2024 og var soljóðandi:

> "Vísandi til umsókn um loyvi til ræning av lomvigareggum í Lonini vestan fyri á Sandoynni í 2025 skal verða sagt frá, at umsóknin verður ikki gingin á møti. Henda niðurstøða er tikin við støði í viðmerkingum og tølum frá Fuglakanningarstøðini á Havstovuni fyri landsins lomvigastovn frá 1972, 1987, 1997-1999 og 2007-2014, umframt árligum tølum úr Skúvoy frá 1972 til 2023.
>
> Mett verður ikki, at tað er ráðiligt at gera inntriv í reiðringina hjá lomviga nakrastaðni í Føroyum, tá samlaði stovnurin enn kann metast at vera í niðurgongd. Tølini úr Skúvoy verða nýtt sum eftirlit fyri landið, og hóast hesi vísa sveiggj upp og niður, so er yvirskipaða gongdin áhaldandi negativ. Nevnast skal eisini, at við fyribils tølum úr Skúvoy frá 2023 sæst ein sera stór niðurgongd síðan 2009, ið kann sammetast við stóru niðurgongdina frá 1972 til 1987.
>
> Við heimild í kunngerð nr. 60 frá 16. mai 1986 um ræning av lomvigaeggum, hevur landsstýrið fyrisett, at Føroya Náttúrugripasavn (Tjóðsavnið) kann veita loyvi til at ræna lomvigaegg í fuglabjørgunum á Sandoynni, Skúvoynni, Stóru Dímun og Suðuroynni til og við 8. juni á hvørjum ári.
> Avgerðin hjá Náttúrugripasavninum (Tjóðsavninum) kann kærast til Mentamálaráðið innan eina viku eftir, at hon er umsøkjaranum kunnug."

Avgerðin hjá Almanna- og mentamálaráðnum, dagfest 7. februar 2025, sum staðfesti avgerðina hjá Tjóðsavninum var soljóðandi:

> "...
> Áhugafelagið Lonin hevur tann 29. november 2024 kært avgerðina hjá Tjóðsavninum um ikki at ganga umsóknini frá áhugafelagnum á møti um loyvi til at ræna lomvigaegg vestan fyri á Sandoynni í 2025.
>
> Áhugafelagið søkti Tjóðsavnið um loyvi tann 3. november 2024, men Tjóðsavnið tók tann 29. november 2024 avgerð um, at umsóknin ikki kundi gangast á møti.
>
> Orsøkin til, at Tjóðsavnið ikki vil ganga umsóknini á møti, er, at Tjóðsavnið ikki metir tað vera ráðiligt at gera inntriv í reiðringina hjá lomviga nakrastaðni í Føroyum, tí samlaði

stovnurin má framvegis metast at vera í niðurgongd, og ræning kann tí skaða stovnin munandi, sbr. í hesum sambandi § 2, nr. 3 í kunngerð nr. 60 frá 16. mai 1986 um ræning av lomvigaeggum.

Tjóðsavnið hevur í avgerðini m.a. víst til tølini úr Skúvoy, ið verða nýtt sum eftirlit fyri alt landið, og sum vísa eina sera stóra niðurgongd síðani 2009, ið kann sammetast við stóru niðurgongdina frá 1972 til 1987.

Áhugafelagið hevur í kæruni harafturímóti ført fram, at ætlanin ikki er at taka meira enn í mesta lagi 500 egg, og at hetta í mesta lagi er 0,6 % av øllum eggunum, og at "..um helvtin verpur uppaftur, verður hetta 0,3% av eggunum."

Sambært kærara hevur Tjóðsavnið ikki nóg gott grundarlag fyri at siga, at ræning av 0,3 til 0,5 % av lomvigaeggunum kann skaða lomvigastovnin munandi.

Kæran hevur verið til ummælis hjá Tjóðsavninum í døgunum 6. januar til 27. januar 2025, men Tjóðsavnið er ikki komið við viðmerkingum til kæruna.

Avgerð
Avgerðin hjá Tjóðsavninum er grundað á eina meting við støði í viðmerkingum og tølum frá Fuglakanningarstøðini á Havstovuni fyri landsins lomvigastovn frá 1972-1987, 1997-1999 og 2007-2014, umframt árligum tølum úr Skúvoy frá 1972-2023.

Hóast viðmerkingarnar frá kærara metir Almanna- og mentamálaráðið tað ikki vera grundarlag fyri at seta til viks metingina hjá Tjóðsavninum sambært § 2, nr. 3 í kunngerð um ræning av lomvigaeggum.

Almanna- og mentamálaráðið staðfestir tí avgerðina hjá Tjóðsavninum um ikki at ganga á møti umsóknina frá Áhugafelagnum Lonini um loyvi til at ræna lomvigaegg vestan fyri á Sandoynni í 2025..."

## 4. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 27. februar 2025 varð klagan send Almanna- og mentamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Umboðsmaðurin vísti ítøkiliga á, at klagarin førdi fram, at noktandi loyvi til at ræna 500 egg í søkta tíðarskeiðnum stendur "í stórari andsøgn til, at tað 4 mánaðir seinni frá 1. oktober til 20. januar er loyvi at skjóta fleiri 1000 lomvigar". Umboðsmaðurin bað ráðið í frágreiðing síni fyrihalda seg til hetta. Samstundis varð Almanna- og mentamálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum skjalayvirlit og øll skjøl í málinum.

Tann 11. mars 2025 sendi Almanna- og mentamálaráðið umboðsmanninum skjølini og soljóðandi viðmerkingar:

“...Avgerðin hjá Tjóðsavninum frá 29. november 2024 var “...tikin við støði í viðmerkingum og tølum frá Fuglakanningarstøðini á Havstovuni fyri landsins lomvigastovn frá 1972-1987, 1997-1999 og 2007-2014, umframt árligum tølum úr Skúvoy frá 1972 til 2023.”

Hóast tølini vísa sveiggj frá ári til ár, er tað fatanin hjá Tjóðsavninum, at yvirskipaða gongdin áhaldandi er negativ, og at tað av hesi orsøk ikki er ráðiligt at gera inntriv í reiðringina hjá lomviga nakrastaðni í Føroyum.

Tjóðsavnið hevur serkunnleika á økinum, og hóast kærari hevur eina aðra fatan, metti Almanna- og mentamálaráðið tað ikki vera nóg gott grundarlag fyri at seta til viks fakligu metingina, sambært § 2, nr. 3 í kunngerð nr. 60 frá 16. mai 1986 um ræning av lomvigaeggum, sum avgerðin hjá Tjóðsavninum var grundað á.

Tann 7. februar 2025 staðfesti Almanna- og mentamálaráðið tí avgerðina hjá Tjóðsavninum.
---
Í klaguni til Løgtingsins umboðsmann vísir klagari á, at tað í avgerðini hjá Tjóðsavninum ikki verður víst til § 2, nr. 3 í kunngerðini, og at tað harvið er ógreitt, hvat Tjóðsavnið grundaði sína avgerð á.

Hóast Tjóðsavnið í avgerðini sjálvsagt átti at havt víst til § 2, nr. 3 í kunngerðini, heldur Almanna- og mentamálaráðið ikki, at kærari í hesum førinum hevur verið í iva um, at avgerðin hjá Tjóðsavninum er tikin við heimild í § 2, nr. 3.

Í kæruni til Almanna- og mentamálaráðið, dagfest 5. desember 2024, skrivar kærari sjálvur: “Tjóðsavnið metir altso sambært §2 stk 3, at ætlaða ræningin í Lonini ”skaðar stovnin munandi”.”
---
Løgtingsins umboðsmaður hevur harafturat heitt á Almanna- og mentamálaráðið um at fyrihalda seg til, at kærari í klagu síni hevur gjørt galdandi, at tað er ein stór andsøgn í, at Tjóðsavnið ikki vil geva loyvi til ræning av 500 lomvigaeggum, tá tað fýra mánaðir seinni er loyvt at skjóta “..fleiri 1000 lomvigar.”

Almanna- og mentamálaráðið skal sum tað fyrsta viðmerkja, at tað ikki finnast almenn tøl fyri, hvussu nógvur lomvigi verður skotin á hvørjum ári. Skjótingin er tó óivað ein viðvirkandi orsøk til vánaligu støðuna hjá lomviganum í Føroyum.

Rætturin at skjóta lomviga er tó ásettur beinleiðis í § 17, stk. 2, litra b í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu. Tað skal ikki søkjast um loyvi, og Tjóðsavnið kann tí ikki nokta nøkrum at skjóta.

Fólk hava við øðrum eitt rættarkrav at skjóta lomviga í ásetta tíðarskeiðinum, sum er frá 1. oktober til 20. januar.

Tjóðsavnið kann, sambært § 1 í kunngerð um ræning av lomvigaeggum, geva loyvi til ræning av eggum. Ein treyt fyri at kunna geva loyvi er tó, at Tjóðsavnið, sambært § 2, nr. 3 í kunngerðini, metir, at ræningin ikki skaðar lomvigastovnin munandi.

> At skjótingin frammanundan (sannlíkt) skaðar lomvigastovnin munandi, merkir ikki, at ræning av eggum ikki eisini kann skaða stovnin munandi. Almanna- og mentamálaráðið dugir tí ikki at síggja nakra andsøgn í, at Tjóðsavnið ikki metir tað vera ráðiligt at geva loyvi til ræning av eggum, samstundis sum løgtingslóg um fuglaveiðu ásetur ein rætt at skjóta lomviga ein part av árinum."

Við tað at Fuglaveiðulógin er undir fyrisitingarheimildunum hjá landsstýriskvinnuni í uttanríkis- og vinnumálum, varð klagan saman við viðmerkingunum hjá Almanna- og mentamálaráðnum send Uttanríkis- og vinnumálaráðnum tann 17. mars 2025 til viðmerkingar. Í skrivinum vísti umboðsmaðurin millum annað á:

> "...Sambært klaguni sýnist støðan vera tann, at onki loyvi er givið til ræning síðani 2011, hóast lógin ásetur, at rænast kann á ávísum støðum í ávísum fuglabjørgum eftir nærri kunngerð.
>
> Av tí at Fuglaveiðulógin hoyrir undir fyrisitingarheimildirnar hjá landsstýriskvinnuni í uttanríkis- og vinnumálum, og tað sýnist ivasamt, hvørt kunngerðin og umsitingin av henni er í samsvar við lógina, verður klagan hervið eisini send Uttanríkis- og vinnumálaráðnum til viðmerkingar."

Tann 24. mars 2025 sendi Uttanríkis- og vinnumálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "…Víst verður til skriv umboðsmansins, dagfest 17. mars 2025, har biðið verður um viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, sum umsitur løgtingslóg um fuglaveiðu.
>
> Heimildin at loyva ræning av lomvigareggum er við kunngerð nr. 60/1986 løgd Tjóðsavninum (Náttúrugripasavninum) at umsita. Ein treyt fyri at fáa loyvi at ræna lomvigaregg er, at myndugleikin metir, at ræningin ikki skaðar stovnin munandi.
>
> Í hesum ítøkiliga føri metir Tjóðsavnið, við støði í gjørdum fuglateljingum, at yvirskipaða gongdin í lomvigastovninum er negativ, og at tað av teirri orsøk ikki er ráðiligt at gera inntriv í reiðringina hjá lomviga nakrastaðni í Føroyum. Almanna- og mentamálaráðið, sum er yvirskipaði myndugleiki Tjóðsavnsins, metir ikki orsøk vera at seta til viks fakligu metingina hjá Tjóðsavninum.
>
> Vísandi til, at ein treyt fyri at fáa loyvi at ræna lomvigaregg er, at ræningin ikki verður mett at skaða stovnin munandi, og vísandi til, at avgerð Tjóðsavnsins er grundað á teljingar í eitt longri tíðarskeið, metir Uttanríkis- og vinnumálaráðið heldur ikki orsøk vera at seta til viks metingina og niðurstøðuna hjá Tjóðsavninum. Mett verður tískil eisini, at kunngerð um at ræna lomvigaregg verður umsitin í samsvari við løgtingslóg um fuglaveiðu.
>
> Leggjast skal at enda afturat, at Løgtingið í løtuni viðger uppskot um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu, sum hevur til endamáls at stytta veiðitíðina eftir m.a. lomviga.

> Lógaruppskotið er m.a. grundað á, at lomvigastovnurin er minkaður heilt nógv, eini 70%, frá fyrstu teljing í 1972 og til seinastu teljing í 2014. "

Tann 17. mars 2025 varð frágreiðingin frá Almanna- og mentamálaráðnum, dagfest 6. mars 2025, send klagara til kunningar og ummælis. Klagari sendi tann 23. mars 2025 viðmerkingar, sum ikki verða endurgivnar her, tí viðurskiftini framganga av klaguni.

Tann 27. mars 2025 valdi umboðsmaðurin at senda Tjóðsavninum klaguna til kunningar og ummælis. Harumframt setti umboðsmaðurin Tjóðsavninum soljóðandi spurning:

> "...vil eg biðja Tjóðsavnið upplýsa, nær síðsta loyvi til at ræna lomvigaegg er givið, sambært kunngerð nr. 60 frá 16. mai 1986 um ræning av lomvigaeggum, og talið av loyvum, sum eru givin síðstu 10 árini..."

Tann 27. mars 2025 vórðu viðmerkingarnar hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, dagfestar 24. mars 2025, sendar klagaranum til kunningar og ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Samskiftið við Uttanríkis- og vinnumálaráðið og við Tjóðsavnið varð leypandi sent Almanna- og mentamálaráðnum til kunningar, og tann 31. mars 2025 gav umboðsmaðurin Almanna- og mentamálaráðnum 14 daga freist til møguligar viðmerkingar. Tann 2. apríl 2025 boðaði Almanna- og mentamálaráðið frá, at ráðið ikki hevði fleiri viðmerkingar til málið.

Tann 1. apríl 2025 sendi Tjóðsavnið umboðsmanninum skriv við svarið til setta spurningin.

## 5. Yvirlit yvir umsóknir og givin loyvir til at ræna lomvigaregg síðani 2010

Yvirlit frá Tjóðsavninum yvir umsóknir til loyvi at ræna lomvigaregg síðstu árini:

"Umsóknir

| | | |
|---|---|---|
| 2025: | Higartil 1 umsókn, | noktandi svar |
| 2024: | 2 umsóknir, | 2 noktandi svar |
| 2023: | 1 umsókn, | 1 noktandi svar |
| 2022: | 1 umsókn, | 1 noktandi svar |
| 2021: | 1 umsókn, | 1 noktandi svar |
| 2020: | 0 umsókn, | |
| 2019: | 1 umsókn, | |
| 2018: | 1 umsókn, | 1 noktandi svar |
| 2017: | 2 umsókn, | 2 noktandi svar |
| 2016: | 1 umsókn, | 1 noktandi svar |
| 2015: | 1 umsókn, | 1 noktandi svar |
| 2014: | 3 umsóknir, | 2 noktandi, 1 partvíst játtað |
| 2013: | 1 umsókn, | 1 noktandi svar |
| 2012: | 2 umsókn, | 2 noktandi svar |
| 2011: | 2 umsókn, | 2 noktandi svar |

2010: 3 umsóknir, 3 játtandi svar

Summi ár áðrenn 2010 varð tíðindaskriv sent út um at einki loyvi fór at vera givið tað árið (2006, 2007, 2008).

Í 2019 var einki svar givið...”

Partvíst játtandi svarið í 2014 var eitt undantaksloyvi til ræning av 50 lomvigareggum í Lítlu Dímun í 2014. Víst varð á, at lomvigastovnurin hevði verið í støðugari minking í longri tíð, og tí var neyðugt at verja stovnin. Allíkavæl varð mett ráðiligt, at lata eitt skert undantaksloyvi til at gera filmsupptøkur og soleiðis dokumentera hendan veiðihátt í Lítlu Dímun.

## 6. Lógargrundarlag

Løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 70 frá 22. mai 2023 (Fuglaveiðulógin) hevur í § 17 áseting um skjóting og veiðu av fugli:

“§ 17. Uppi á landi yvirhøvur, eisini á vøtnum og firðum, víkum og sundum og á sjónum yvirhøvur út at fiskimarkinum er allur fuglur friðaður móti skjóting og veiðu, sum ikki er tilskilaður í hesi grein, sbr. §§ 14 og 16.
*2. stk.* Sum skilað til niðanfyri skal verða loyvt at veiða ella skjóta hesar fuglar ella fuglasløg:
a) alt árið: Kráku, ravn, kjógva, skúgv, havhest, súlu og øll másasløg, tó ritu bert á sjónum.
b) 1. oktober – 20. januar: Lunda, lomviga og álku.
c) 1. oktober – 30. november: Skarv.
*Stk. 3.* Veiða kann hóast stk. 2 ikki fara fram í ósamsvari við verndartiltøk eftir løgtingslóg um náttúruvernd.”

Viðvíkjandi spurninginum í hesi klagu um ræning av lomvigareggum hevur Fuglaveiðulógin hesa áseting í § 18:

§ 18. Tann í § 17 fyrisetta friðing umfatar eisini pisur, egg og reiður. Tó skal tað verða loyvt veiðurætthavara at taka líra.
2. stk. Loyvt er at taka lomvigaregg á hvørjum ári til og við 8. juni á ávísum støðum í ávísum fuglabjørgum eftir nærri kunngerð frá landsstýrismanninum.”

Við heimild í § 18, stk. 2 í Fuglaveiðulógini hevur landsstýrið givið kunngerð nr. 60 frá 16. mai 1986 um ræning av lomvigareggum, sum er soljóðandi:

“§ 1. Føroya Náttúrugripasavn kann veita loyvi til at ræna lomvigaegg í fuglabjørgunum á Sandoynni, Skúvoynni, Stóru Dímun og Suðuroynni til og við 8. juni á hvørjum ári.

§ 2. Treytirnar, fyri at loyvi kann veitast eftir § 1, eru:
1) at umsókn verður send náttúrugripasavninum innan 20. mai, á hvørjum ári, í 1986 tó 1. juni,

2) at upplýst verður, hvørji fara til ræningar, nær og hvar,
3) at náttúrugripasavnið metir, at ræningin ikki skaðar stovnin munandi,
4) at ræningin ikki forðar vísundaligum kanningum, og
5) at fráboðað verður náttúrugripasavninum, tá ræningin er at enda og talið av rændum eggum.

§ 3. Avgerðin hjá náttúrugripasavninum kann kærast til landsstýrið innan eina viku eftir, at hon er umsøkjaranum kunnug.

§ 4. Kunngerðin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd."

Ásetingin í § 18, stk. 2 í Fuglaveiðulógini var samtykt við løgtingslóg nr. 33 frá 16. apríl 1986. Í løgtingsmálinum síggjast hesar viðmerkingar til § 18, stk. 2 (Løgtingsmál 91/1985, Løgtingstíðindi 1985, bind A, s. 411):

"**Viðmerkingar**
Galdandi fuglaveiðulóg er frá 1954 og er síðan tá broytt fleiri ferðir.
Fyriliggjandi uppskot snýr seg um at broyta fuglaveiðulógina soleiðis, at
1)...
2)...
3) Loyvt verður at taka lomvigaregg á hvørjum ári til og við 8. juni.
...
Viðvíkjandi 3): Vandi er fyri, at siðurin at ræna egg fellur burtur, og verður tí eftir uppskotinum loyvt at ræna lomvigaregg, tó ikki seinni enn 8. Juli, við tað at lomvigi ikki leggur aftur, um eggini verða tikin seinni.
Upplýsast kann, at landsstýrið hevur sett nevnd at gera uppskot til endurskoðaða fuglaveiðulóg.
...
**Álit**
Málið er lagt fram 3. apríl 1986 av landsstýrinum og varð aftaná 1. Viðgerð 4 í s.m. beint í umhvørvisnevndina...
...
Tilfarið sum fyriliggur í málinum, vísir, at stovnurin framvegis er í afturgongd, men tilfarið vísir eisini, at afturgongdin ikki hevur verið so ógvuslig hesi fimm árini, lomvigin hevur verið friðaður. Nevndin er tí komin til ta niðurstøðu, at friðingin hevur hjálpt uppá stovnin, og at friðingin framvegis eigur at vera í gildi.

...
**Uppskot til samtyktar**
...
Nevndin hevur eisini viðgjørt spurningin um aftur at loyva ræning, og heldur nevndin, at hetta loyvi kann verða givið undir ávísum treytum. Nevndin skýtur tí upp at broyta uppskot landsstýrisins soleiðis, at tað bert verður loyvt at taka lomvigaregg á ávísum støðum eftir nærri kunngerð frá landsstýrinum. Hetta metir nevndin at vera neyðugt fyri ikki at ørkymla tey kanningarúrslit, sum higartil fyriliggja, og fyri at ein møgulig ræning kann samskipast

við tær vísundaligu rannsóknirnar av lomvigastovninum. Nevndin setir tí til uppskot landsstýrisins fram fylgjandi

**Broytingaruppskot**
Í § 1, nr. 2, verður 2. stk. soljóðandi:
"2. stk. Loyvt er at taka lomvigaregg á hvørjum ári til og við 8. juni á ávísum støðum í ávísum fuglabjørgum eftir nærri kunngerð frá Føroya Landsstýri..."

## 7. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um kæruavgerð hjá Almanna- og mentamálaráðnum frá 7. februar 2025, sum staðfesti noktandi avgerð, tann 29. november 2024, frá Tjóðsavninum viðvíkjandi ræning av lomvigareggum.

Áhugafelagið hevur víst á, at tað einans er áhugað í at ræna eina minni nøgd av eggum. Felagið heldur, at avmarkaða nøgdin ikki kann metast at skaða stovnin munandi, tá loyvt er at skjóta túsundvís av lomvigum nakað seinni.

Áhugafelagið vísir í klagu síni á, at sandingar hava fingið loyvi frá Føroya Náttúrugripasavnið (Tjóðsavninum) at ræna lomvigaregg til og við 2010.

Sambært upplýsingum frá Tjóðsavninum hava tað verið árligar umsóknir um loyvi til at ræna lomvigaregg síðani 2011, tó ikki í 2019. Einasta loyvi, sum er latið síðani 2010, er eitt partvíst loyvi í 2014 til at ræna 50 lomvigaregg í Lítla Dímun at gera filmsupptøkur og dokumentera veiðiháttin. Loyvi hevur ikki verið givið hvørt ár fram til 2010, við tað at tíðindaskriv varð sent út um, at einki loyvi fór at verða givið í árunum 2006, 2007 og 2008.

Tjóðsavnið hevur sum grundarlag undir síni støðutakan at nokta loyvi til ræning av lomvigareggum víst á, at tað ikki er ráðiligt at gera inntriv í reiðringina hjá lomviga nakrastaðni í Føroyum, tá samlaði stovnurin enn kann metast at vera í niðurgongd. Almanna- og mentamálaráðið metti seg ikki hava grundarlag fyri at seta til viks fakligu metingina hjá Tjóðsavninum, og sama sjónarmið hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið givið til kennar.

Samstundis tykist greitt, at skjóting av lomviga fer fram, sambært Fuglaveiðulógini.

Almanna- og mentamálaráðið hevur í viðmerkingum sínum víst á teirra meting av muninum í Fuglaveiðulógini millum rættin til at skjóta lomviga og rættin til at ræna lomvigaregg:

> "Rætturin at skjóta lomviga er tó ásettur beinleiðis í § 17, stk. 2, litra b í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu. Tað skal ikki søkjast um loyvi, og Tjóðsavnið kann tí ikki nokta nøkrum at skjóta.

> Fólk hava við øðrum (orðum, *mín viðmerking)* eitt rættarkrav at skjóta lomviga í ásetta tíðarskeiðinum, sum er frá 1. oktober til 20. januar.
>
> Tjóðsavnið kann, sambært § 1 í kunngerð um ræning av lomvigaeggum, geva loyvi til ræning av eggum. Ein treyt fyri at kunna geva loyvi er tó, at Tjóðsavnið, sambært § 2, nr. 3 í kunngerðini, metir, at ræningin ikki skaðar lomvigastovnin munandi."

Almanna- og mentamálaráðið sýnist sostatt vera av tí fatan, at skjóting av lomviga og ræning av lomvigareggum skal viðgerast á hvør sín hátt, og at Tjóðsavnið hevur heimild til heilt at nokta ræning av lomvigareggum.

Eg eri ikki samd við Almanna- og mentamálaráðnum í hesi lógartulking. Bæði skjóting av lomviga og ræning av lomvigareggum eru heimilað í Fuglaveiðulógini. Fyri skjóting hevur Løgtingið ásett tíðarskeiðið beinleiðis í lógina, meðan fyri ræning av eggum hevur Løgtingið álagt landsstýrismanninum at áseta nærri í kunngerð. Tað er tó eftir míni meting greitt, at Fuglaveiðulógin fyrisetur og lóggevur ein avmarkaðan rætt til ræning, tá ið ásett er í § 18, stk. 2: "Loyvt er at taka lomvigaregg á hvørjum ári til og við 8. juni á ávísum støðum í ávísum fuglabjørgum eftir nærri kunngerð frá landsstýrismanninum."

Henda fatan er eftir míni meting eisini stuðlað í lógarmálinum, løgtingslóg nr. 33 frá 16. apríl 1986, tá ið núgaldandi áseting um at ræna lomvigaregg kom í Fuglaveiðulógina. Í lógarmálinum sæst, at Løgtingið samtykti heimild til at ræna lomvigaregg, hóast stovnurin tá framvegis var í afturgongd, tó at afturgongdin ikki hevði verið so ógvuslig síðstu fimm árini, meðan lomvigin hevði verið friðaður.
Grundgevingin fyri at seta ræning av lomvigareggum inn í lógina var, at vandi var fyri, at siðurin at ræna egg fall burtur. Tíðaravmarking varð tó sett á, vísandi til at lomvigi ikki leggur aftur, um eggini verða tikin seinni.

Vanlig løgfrøðilig tulking av hesi áseting má eftir míni meting vera, at løgtingið hevur avgjørt, at ræning av lomvigareggum skal kunna fara fram, men eftir nærri leisti. Hetta, fyri at siðurin at ræna ikki fellur burtur.

Eg haldi tí ikki, at Fuglaveiðulógin heimilar landsstýrismanninum heilt at forbjóða ræning í longri áramál uttan atlit til, at Løgtingið í 1986, sum fortreyt fyri § 18, stk. 2, hevur ynskt at varðveita siðin at ræna egg.

Í mun til hetta er ivasamt, um lýsta kunngerðin í roynd og veru er í samsvar við § 18, stk. 2 í Fuglaveiðulógini, við tað at kunngerðin letur upp fyri, at einki loyvi verður givið yvirhøvur.

Óansæð, hvussu mett verður um heimildina fyri sjálvari kunngerðini, er tað mín fatan, at umsitingin av henni síðstu árini er ivasom. Her hugsi eg serliga um, at hvørki noktandi avgerðin hjá Tjóðsavninum ella kæruavgerðin hjá Almanna- og mentamálaráðnum síggjast viðgera ella taka atlit at varðveitslu av siðinum at ræna egg, og at einki loyvi er latið síðani eitt partvíst loyvi

í 2014. Hesin umsitingarháttur hevur ført til tann mun, sum klagarin hevur víst á millum ávikavist rættin at skjóta lomviga og at ræna lomvigaregg.

Eg gevi mær far um, at Løgtingið í løtuni viðger uppskot um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu, sum hevur til endamáls at stytta veiðitíðina eftir m.a. lomviga. Lógaruppskotið er m.a. grundað á, at lomvigastovnurin er minkaður heilt nógv, eini 70%, frá fyrstu teljing í 1972 og til seinastu teljing í 2014. Hetta kann sjálvandi takast við í metingina hjá Tjóðsavninum um, hvørt loyvi til ræning eigur at verða givið. Men so leingi, sum Løgtingið ikki hevur samtykt aðrar reglur viðvíkjandi ræning av lomvigareggum, haldi eg, at Tjóðsavnið og Almanna- og mentamálaráðið hava skyldu at taka atlit til at varðveita siðin at ræna egg og til, at lógin ásetir, at loyvt er at taka lomvigaregg á hvørjum ári.

Eg ásanni, at avmarkandi umsitingin av kunngerðini um ræning av lomvigareggum hevur verið fylgd í fleiri ár, og at hetta skyldast stúran um lomvigastovnin. Eg mæli tó til, at Almanna- og mentamálaráðið endurskoðar kæruavgerðina og avmarkandi umsitingina av kunngerðini, ella heitir á Uttanríkis- og vinnumálaráðið um at endurskoða heimildina fyri ræning av lomvigareggum í § 18, stk. 2 í Fuglaveiðulógini, so samsvar er millum Fuglaveiðulógina, kunngerðina og umsitingina av henni.

Eg fari eisini at mæla Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, sum varar av Fuglaveiðulógini, til at taka viðurskiftini viðvíkjandi at ræna lomvigaregg við í ta heildarviðgerð av Fuglaveiðulógini, sum ráðið hevur víst á í sambandi við løgtingsmál LM-066/2024.

At enda fari eg at biðja bæði Almanna- og mentamálaráðið og Uttanríkis- og vinnumálaráðið lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður